# Nýggj café við Saltangará

**Við Café Blikk fær triðstørsta plássið í landinum nú sína egnu café**

**HANDILSLÍV**
*tíðindaskriv*

Mánadagin klokkan 11 letur nýggja staðið upp, men longu seinnapartin sunnudagin klokkan 15 ber til at støkka inn á gólvið, tí tá verður almenn móttøka, har millum annað Heri Joensen úr Týr fer at hugna um við klassiskum gittarspæli.

Christian Høgni Jacobsen, Brynjolvur Nielsen, Tummas Petur Thomassen og Kári Streymoy eiga og reka caféina, ið heldur til í tí nú umbygda og víðkaða húsinum, har blikksmiðjan hjá Bjarna Hansen og seinni eisini blómu- og gávuhandil var í mong ár. Harav navnið Blikk Café.

Nýggju eigararnir hava gjørt sjálvt húsið liðugt, men annars umbygt og bygt víðari á tað, sum var frammanundan, so størri og meira rúmsátt er. Nú alt er liðugt, hevur nýggja caféin útivið tvær góðar hæddir at ráða yvir, umframt at eitt lítið loft eisini er.

Tilsamans átta fólk fara at starvast í Blikk Café, har Jona Michaelsen verður dagligur leiðari.

# Gravgangur eftir at verða formaður

**Á aðalfundinum í Maskinmeistarafelagnum í næstum, eru tað heilir fýra mans, sum bjóða seg fram at verða formaður í felagnum**

**STRÍÐSVAL**
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er rættiligur gravgangur eftir at verða formaður í Føroya Maskinmeistarafelag.

Hesi seinastu umleið átta árini hevur formaðurin verið valdur beinleiðis, men alla hesa tíðina er tað ikki meiri enn komið fyri, at meiri enn eitt valevnið hevur verið til formanssessin

Men á næsta aðalfundi, sum verður um góðar tveir mánaðir, má av álvara sannast, at stríðsval verður um formanssessin.

Tað eru nevniliga heili fýra mans, sum bjóða seg fram at verða formaður.

Hvørt valskeið er tvey ár.

Jógvan Nybo, sum hevur verið formaður í nøkur valskeið, hevur boðað frá, at verður hann afturvaldur, tekur hann av.

Freistin at stilla upp til formansval, var 15. desember. Og tá ið freistin var úti, vóru fleiri avbjóðarar til starvið.



*Jógvan Nybo fær óvæntaða stóra mótstøðu á aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum um góðar tveir mánaðir*

Tað eru ikki færri enn tríggir mans, sum bjóða honum av á valinum og sostatt er greitt, at Jógvan Nybo fær harða kapping á valinum.

Teir tríggir avbjóðararnir á formansvalinum eru næstformaðurin í felagnum, Páll Hansen úr Havn, Jóan Petur Patursson, sum er tiltakslimur í nevndini. Og seinasti avbjóðarin er Finnleif Guttesen, sum áður hevur verið formaður í Maskinmeistarafelagnum eitt skifti.

Jógvan Nybo dugir ikki at siga, hví hesin brádligi áhugin er íkomin fyri at verða formaður í Maskinmeistarafelagnum.

Hann dugir heldur ikki at siga, um eftir er ein avleiðing av, -at ónøgd hevur verið við arbeiðið hjá nevndini.

– Eg áni tað ikki, sigur hann.

**Longu byrjað**

Annars eru eisini trý uppskot komin inn um nevndarlimir. Talan er um Jørgin Mørkøre og Regin Olsen, sum báðir eru nevndarlimir í løtuni og áðurnevndi tiltakslimurin, Jóan Petur Patursson.

Men her skal leggjast afturat, at tað ber til at skjóta valevni til sjálva nevndina upp á sjálvum aðalfundinum

Hinvegin er tað greitt, at fleiri uppskot til formansvalið vera ikki at velja ímillum, tí tey uppskotini skuldi verða komin inn í seinasta lagið um ársskiftið.

Aðalfundurin verður 24. mars, men enn er ikki greitt, hvar hann verður

Og valini eru longu byrjað, tí teir limir, sum eru burturstaddir, ella annars ikki fáa møt á aðalfundinum, kunna atkvøða við brævatkvøðu, teir seinastu tríggjar mánaðirnar undan aðalfundinum.

# – Verkætlanin virkar skilagóð

**P/F Skálafjarðatunnilin fer 18. januar at handa landsstýrismanninum í Vinnumálum umsókn um tunnilsgerð millum Skálafjørðin og høvuðsstaðarøkið. Bjarni Djurholm sigur, at undirtøka er í samgonguni at taka upp samráðingar.**

**SKÁLAFJARÐARTUNNILIN**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

P/F Skálafjarðatunnilin hevur nú orðað umsókn um tunnilsgerð, hendan verður handað landstýrismanninum í Vinnumálum, Bjarna Djurholm, á almennum fundi í Norðurlandahúsinum hósdag 18. januar. Henda verkætlan setur sambært landsstýrismanninum nakrar sera prinsipiellar spurningar, um hvussu samferðslukervið verður rikið í framtíðini.

– Vit hava tosað saman um verkætlanina javnan, og hon er skilagóð, hvat viðvíkir cost/benefit. Men hesin møguleiki er ein av tveimum. Sambandið kann gerast antin privat ella alment. Tað er greitt, at verður ein almenn loysn vald, bindir hetta Landskassan fyri eini íløgu, ið sambært útrokningum hjá P/F Skálafjarðartunnilinum eru millum 150-200 milliónir. Verður ein privat loysn vald, er møguleiki at lat P/F Skálafjarðartunnilin gera hana ella at bjóða verkætlanina út í Føroyum ella uttanlands.

– Vit hava viðgjørt hetta fleiri ferðir bæði í Landsstýrinum og í samgonguni, og her bendir á, at tað er breið semja um, at Landstýrismaðurin skal fáa í lag neyðugu heimildir, at taka upp samráðingar við partarnar aftan fyri verkæltanina. Landsstýrismaðurin kann ikki av sínum eintingum binda landið til verkætlanir, ið røkka 25 ár fram. Tí verður tað fyrsta stigið, at Vinnumálaráðið biður Løgtingið um heimild at taka upp samráðingar, greiðir Bjarni Djurholm frá.

– Verður ein privat loysn vald, er tað greitt, at vit tryggja okkum, at atlit til vinning ikki ganga útyvir brúkbarheitina. Tað er greitt, at orsøkin til, at privatir íleggjarar hava áhuga í eini tílíkari verkætlan er, at tey síggja møguleika fyri at fáa vinning av íløgum sínum. Okkara uppgáva í hesum máli er at tryggja, at skilagóð javnvág er í millum forrætning og samfelagsnyttu. T.v.s. at vit í samráðingunum tryggja, at brúkarin ikki rindar óneyðuga høgan kostnað fyri at sleppa gjøgnum tunnilin, sigur Bjarni Djurholm.

– Um tunnilin verður gjørdur av almennum ella privatum, er tað í báðum førum ein treyt, at ein slíkur tunnil passar inn í framtíðar almennu samferðsluætlanina, linjuføringin skal t.d. vera í trá við vegætlanina hjá tí almenna, sigur Bjarni Djurholm at enda.

**FAKTA**

Sambært uppskotinum hjá P/F Skálafjarðatunnilinum fer tunnilin ætlandi niður millum Sund og Kallanes, haðani hann fer norður eftir til eina rundkoyring undir Saltnesgrynnuni, har hann greinast sundur. Úr rundkoyringini fer grein upp til Sjóvar og ein grein upp við Løkin í Runavík. Samstundis verður eisini kannað, hvørt skilabest er at nýta aðra tunnilsloysn. Vestara alternativið er ein tunnil beinleiðis til strendur, meðan eystara alternativið er tunnil beinleiðis til Løkin í Runavík. Í tíðindaskrivi verður sagt, at lendisviðurskiftini millum Toftavatn og Runavík eru sera avbjóðandi. Hetta tí tunnilsmunin og atkomuvegurin skulu skapast, so økið kring Toftavatn framvegis skal varðveita síni sereyðkenni.